## Vit ynskja samstarv

**Formaðurin av G! Festivalinum, Jón Tyril, vónar, at G! Festivalurin og GÍ kunnu finna eina semju um samstarv. – Eg haldi ikki tað ber til at siga, at bygdin er farin í tvey, tí partarnar ikki eru komnir ásamt um samstarv, sigur hann**

STRÍÐ Í GØTU
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Jón Tyril er formaðurin av G! Festivalinum, og hann ásannar, at stevið millum GÍ og G! Festivalin ikki hevur verið av tí besta seinastu vikurnar.

– Vit hava roynt og royna framvegis at finna eina semju við GÍ, sigur Jón Tyril.

Hann greiðir frá, at G! Festivalurin hevur bjóðað GÍ at standa fyri tivolinum í Syðrugøtu, meðan GÍ ynskir bæði at standa fyri tivoli og matsølu, og hesum ynski vil G! Festivalurin ikki ganga teimum á møti.

Togtoganin millum partarnar snýr seg fyrst og fremst um matsøluna, ið vanliga kastar nógvan pening av sær. Hvørgin partur ynskir at geva seg, tí inntøkan av matsøluni hevur stóran týdning fyri raksturin hjá feløgunum báðum.

Jón Tyril fortelur, at í fjør hevði G! Festivalurin eitt undirskot á góðar 150.000 krónur, meðan GÍ hevði eitt fitt yvirskot, og henda gongd má venda, um tað skal verða G! Festivalinum lív lagað.

– Inntøkurnar av matsøluni hava týdning fyri, at G! Festivalurin kann mala fíggjarliga, og tí vilja vit ikki lata matsøluna frá okkum, sigur Jón Tyril.

Sum skilst vann GÍ millum 25-30.000 í matsøluni í Syðrugøtu í fjør.

### Eingin gjógv

– Eg haldi ikki tað ber til at siga, at bygdin er farin í tvey, tí partarnar ikki eru komnir ásamt um samstarv.

Jón Tyril er rættiliga avgjørdur, tá vit spyrja hann um tað ikki er óheppið, at gøtubygd er klovna í tveir partar, nakrar fáar dagar undan G! Festivalinum og Gøtustevn-uni.

Hann er av teirri áskoðan, at G! Festivalurin og Gøtustevnan framhaldandi eiga at vera sama vikuskiftið, tí so er møguleiki fyri einum mennandi samstarvi millum partarnar.

– Her er talan um eitt mentanartiltak og eina bygdastevnu. Eg haldi tað er skilagott at hava hesi bæði tiltøk sama vikuskiftið, tí bygdin er lítil, og vit hava tí alla orsøk til at samstarva, heldur Jón Tyril

### Vaktarfólk

Í samband við G! Festivalin, hava fyriskipararnir mett, at tørvur verður á fólki til góðar 400 tímar til vaktarhald. Í fjør varð semja gjørd millum GÍ og G! Festivalin um, at GÍ veitti festivalinum vaktarhald, og aftur fyri skuldi ítróttafelagið sleppa at skipa fyri tivoli og matsølu í Syðrugøtu.

Naggatódnin í løtuni millum GÍ og G! Festivalin ber við sær, at G! Festivalurin ikki kann vænta sær vaktarfólk frá GÍ, og hetta kann elva til ein stóran trupulleika.

– Eg dugi snøgt sagt ikki at siga, um vit fara at finna eina semju, men tað skal verða mín vón. Eydnast ikki at finna eina semju, verða vit noyddir at leita eftir vaktarfólki aðrastaðni, sigur Jón Tyril.

Hann leggur afturat, at bæði Gøtustevna og G! Festival vóru í 2002, og tá var G! Festival í Syðrugøtu, og Gøtustevna í Norðragøtu. Tað ber eisini væl til, hóast tað óiva er skilabest og lættast fyri báðar partar at samstarva um tiltøkini.

# Stríð í Gøtu



*– Vit hava givið okkum nóg mikið. Eg hevði vónað, at vit fingu somu samstarvsavtalu sum í fjør, men tað røkist ikki fyri tí, tí teir vilja ikki lata matsøluna frá sær, sigur formaðurin í GÍ Jógvan Gregersen*

**Tað er kalt millum GÍ og G! Festivalinum, stutt fyri G! Festivalin og Gøtustevnu. Orsøkin til stríðið er spurningurin um matsølu í Syðrugøtu, og hvørgin vil geva seg. – Kommunan hevur eftir mínum tykki veruliga klokkað í tí, sigur formaðurin í GÍ, Jógvan Gregersen**

STRÍÐ Í GØTU
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Tað er ein rættilig orrusta íkomin í Gøtu í samband við Gøtustevnu og G! Festivalin tann 16. og 17 juli. Tað er ísakalt millum Ítróttafelagið, GÍ, og tónleikasamtakið, Grót, og í løtuni røkist lítið fyri, at partarnar kunnu semjast, áðrenn stevnan og festivalurin fara av bakkastokki annað vikuskiftið.

Stríðið snýr seg um, hvørt tað skal vera GÍ ella G! Festivalurin, ið skulu standa fyri matsøluni í Syðrugøtu. Matsølan kastar vanliga nógvan pening av sær, og hvørgin partur vil lata inntøkuna frá sær.

Í fjør høvdu GÍ og G! Festivalurin eitt samstarv, sum bar við sær, at GÍ veitti festivalinum ókeypis vaktarfólk, og fekk afturfyri møguleikan at hava tivoli og matsølu í Syðrugøtu. Í ár er vent í holini.

G! Festivalurin hevur í ár fingið ræðisrættin frá Gøtu kommuna yvir Syðrugøtu, og fyrireikararnir av G! Festivalinum ynskja tí ikki at lata matsøluna til GÍ, tí hon gevur pening í skjáttuna. GÍ hevur ongan áhuga í at lata G! Festivalinum vaktarfólk, um ítróttafelagið ikki sleppur at hava tivoli og matsølu í Syðrugøtu.

### Fundir

Seinastu vikurnar hava fleiri fundir verið millum G! Festivalin og GÍ, men partarnir hava ilt við at finna eina semju um matsøluna. Sum skilst hevur ein semingsmaður eisini roynt seg, men uttan úrslit.

Verður eingin semja funnin millum partarnar, verður úrslitið, at G! Festivalurin fer at halda til í Syðrugøtu, meðan Gøtustevnan verður í Norðragøtu.

### Klokkað í tí

Formaðurin í GÍ, Jógvan Gregersen, er ógvuliga harmur um, at Gøtu kommuna fyrr í ár gav G! Festivalinum ræðisrættin yvir Syðrugøtu.

– Vit hava havt Gøtustevnu í 22 ár og hon er góðkend av ÍSF, og nú fer kommunan út og gevur festivalinum bæði stuðul og ræðisrættin yvir Syðrugøtu. Kommunan hevur eftir mínum tykki veruliga klokkað í tí, vísir ein avgjørdur Jógvan Gregersen á.

Hann sigur, at GÍ hevur góðtikið, at G! Festivalurin er sama vikuskiftið sum stevnan, men ítróttafelagið vil ikki vil lata meir frá sær.

– Vit hava givið okkum nóg mikið. Eg hevði vónað, at vit fingu somu samstarvsavtalu sum í fjør, men tað røkist ikki fyri tí, tí teir vilja ikki lata matsøluna frá sær, sigur formaðurin í GÍ.

Jógvan Gregersen setir spurning við, hvussu skilagott tað er, at ein lítil kommuna sum Gøtu kommuna hýsir tveimum tiltøkum, ið eftir øllum at døma skulu kappast sama vikuskiftið.

Hann heldur lítið um, at Gøtustevnan og G! Festivalurin, ið eru tvey stór tiltøk, verða noydd at kappast á ójøvnum føti. Formaðurin í GÍ sipar til, at kommunan hevur veitt festivalinum fíggjarligan stuðul, ræðisrætt yvir Syðrugøtu og dansiloyvi, uttan at GÍ er tikið upp á ráð.

### Onga viðmerking

Vit ætlaðu at spyrja borgarstjóran í Gøtu kommunu, Halldóru Ranghamar, um útsagnirnar hjá formanninum í GÍ um leiklutin hjá Gøtu kommunu í stríðnum millum GÌ og G! Festivalin, men hon bar seg undan at gera nakra viðmerking.



# Til Føroya at siga takk

**Frá 1972 til 1978 ferðaðist Lorraine Britten úr Suðurafrika saman við Winnie Mandela og øðrum kvinnum út á tiltiknu fangaoynna Robben Island, har maður hennara sat sum fangi. Í hesum tíðarskeiði fekk hon reglulig brøv frá táverandi forkvinnuni í Amnesty í Føroyum, Anette Wang, sála. – Vit gloyma ikki tey undurfullu og eggjandi brøv, hon sendi okkum, tá okkara lív var sera hart í Suðurafrika, sigur Lorraine Britten**



*– Vit høvdu ikki loyvi at hava fleiri enn ein gest í húsi okkara samstundis, tí løgreglan óttaðist, at vit hildu fundir og løgdu ætlanir. Maður mín slapp ikki at ferðast, enntá ikki til Cape Town, sum tekur ein hálvan tíma við bili at vitja, og løgreglan skrivaði hvønn dag rapport um okkum, greiddi suðurafrikanska Lorraine Britten frá á tíðindafundi týsmorgunin*

*mynd: Jens Kristian Vang*

VITJAN
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*

Føroysku fjølmiðlarnir fingu týsmorgunin høvið at hitta eitt av mongu offrunum undir rasistisku apartheid skipanini í Suðurafrika, sum var í gildi frá 1948 til 1994 í Suðurafrika.

Tað er suðurafrikanska kvinnan Lorraine Britten, sum í hesum døgum vitjar í Føroyum í sambandi við, at Amnesty International Føroya Deild stuðlaði henni við brøvum frá 1972, tá maður hennara gjørdist samvitskufangi hjá Amnesty á somu oyggj sum Nelson Mandela, Robben Island.

Fyrrverandi forkvinnan í Amnesty í Føroyum, Anette Wang, sum setti seg í samband við Lorraine Britten, og umframt regluligt brævasamskifti frá 1972-1978, tá maður hennara sat fangi, helt vinalagið fram millum Anette og Lorraine, eisini eftir at maður hennara, Frank Anthony, andaðist. Tær hittust á fyrsta sinni í Onglandi, og Anette vitjaði síðani Lorraine í 1984 í heimi hennara í útjaðaranum í Cape Town, Brackenfell.

– Eg lovaði altíð Anettu, at eg skuldi koma at vitja hana, men tíverri lat hetta seg ikki gera, fyrrenn hon var farin, segði Lorraine á tíðindafundinum. Hon undirstrikaði tó, at hon nú hevur høvið at takka Amnesty í Føroyum fyri umsorganina gjøgnum hørðu árini í sjeytiárunum.

### Stríddist fyri útbúgving

Maður Lorraine var virkin limur í "Unity Movement of South Africa", sum stríddist fyri betri útbúgvingarmøguleikum fyri suðurafrikansku íbúgvarnar. Umframt hetta stríddist felagsskapurin og Frank Anthony fyri rættvísari býti av landjørðini, og fyrst í sjeytiárunum varnaðist apartheid-stjórnin, at felagsskapurin var vorðin ein vandi, og tí fóru tiltøk í verk at basa virksemi felagsskapsins.

Í 1971 varð Frank Anthony saman við 13 øðrum limum handtikin av stjórnini, og í 1971 varð hann ákærdur fyri at hava framt yvirgang. Eftir eina rættarsak frá august í 1971 til mars 1972, sum var longsta politiska rættarsakin í Suðurafrika, varð hann dømdur og settur fastur á Robben Island saman við millum øðrum Nelson Mandela, táverandi andstøðuleiðara í ANC flokkinum.

Hetta var byrjanin til eina harða og torføra tíð fyri Lorraine, sum júst hevði átt eina dóttir. Hon slapp at síggja mann sín ein hálvan tíma einaferð um mánaðin, og ferðin út á Robben Island tók tilsamans fýra tímar.

Lorraine, tiltikna Winnie Mandela - sum eisini fór at vitja mann sín - og aðrar kvinnur vórðu á hesum ferðum koyrdar niður í lastina saman við fraktini umborð á skipunum.

### Bræv úr Føroyum

Eftir at Frank Anthony var vorðin fangi á Robben Island, endaði navn hansara á einum lista fyri samvitskufangar hjá Amnesty International. Táverandi forkvinnan í Føroyum, Anette Wang, fór at skriva bræv til Lorraine Britten, og var hetta byrjanin til eitt lívlangt vinalag teirra millum.

– Eg hevði ongantíð hoyrt um Føroyar og fann mær sjóneykuna fram, tá eg fekk bræv úr hesum fjarskotna landi, og saman við fyrsta brævinum sendi Annette eisini ein kjóla til dóttrina, sigur Lorraine flennandi. Mitt í vónloysinum sigur Lorraine, at brævið gav henni eina kenslu av, at hon ikki var einsamøll, og at onkur stóð saman við henni í sorgini.

Tá Annette Wang fyri tveimum árum síðani andaðist, skrivaði Lorraine m.a.:"Vit vilja ongantíð gloyma tað arbeiði, hon gjørdi fyri Amnesty International. Vit gloyma ikki hennara undurfullu og eggjandi brøv, hon sendi okkum, tá okkara lív var sera hart her í Suðurafrika". So stóran týdning høvdu brøvini úr Føroyum fyri neyðstøddu offrini í Suðurafrika.

### Leyslatin - og tó

Í 1978 rann upp dagurin, tá Frank Anthony varð leyslatin, men hetta merkti ikki, at hann fekk frælsi. Fleiri treytir vórðu settar familjuni, og hetta var sambært Lorraine torført at liva undir.

– Vit høvdu ikki loyvi at hava fleiri enn ein gest í húsi okkara samstundis, tí løgreglan óttaðist, at vit hildu fundir og løgdu ætlanir. Maður mín slapp ikki at ferðast, enntá ikki til Cape Town, sum tekur ein hálvan tíma við bili at vitja, og løgreglan skrivaði hvønn dag rapport um okkum, greiðir hon frá.

Lorraine Britten arbeiddi øll hesi árini sum sjúkrasystralærari, og tí høvdu tey neyðugu inntøkurnar at lívbjarga sær (eftir suðurafrikanskum mátistokki). Men hon sigur, at tey hava verið heppin samanborið við tær túsundtals familjur, sum ikki hava havt neyðugu umstøðurnar at berja seg ígjøgnum undirkúganina.

– Umframt arbeiði hevði eg vinir og familju, sum stuðlaðu mær, og tí havi eg havt ein framíhjárætt samanborið við aðrar suðurafrikanskar familjur, sigur Lorraine Britten at enda.

Ein fantastiskur endi á tíðindafuninum, har ein kvinna, sum hevur alla orsøk at vera beisk, miðskeiðis í sorg, sakni og grovum mismuni kastar ljós á tað, hon hóast alt hevur at takka fyri. Eitt sinnalag, vit ríku luksusdýr í vesturheiminum eiga at læra nakað av.

Óli Jakobsen, formaður í Fiskimannafelagnum, hevur í nógv ár verið limur í Amnesty, og hann hevur samskipað ferðina hjá Lorraine til Føroya.



*Fyrrverandi forkvinna í Amnesty International Føroya Deild, Anette Wang, byrjaði í 1972 at senda brøv til Lorraine, og tað var byrjanin til eitt lívlangt vinalag*